# Eivør á breddanum í Íslandi

**Eivør er í hesum døgum at síggja á heilsíðu lýsingum í íslendsku bløðunum og orsøkin er, at stórar framførslur eru fyri framman**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Eivør Pálsdóttir framførur ikki so ofta í Íslandi, men tá hon ger tað, so eru yvirskriftirnar vísar í bløðunum. Íslendsk bløð hava í hesum døgum heilsíðu lýsingar við Eivør og orsøkin er, at stórar framførslur eru fyri framman.

Tann 30. apríl syngur Eivør í Langholtskirkjuni og á skránni er Håb efir Jan Hoybye. Fimm tónleikarar leika við, umframt at eitt stórt kór er við. Gradualekórinn er kór við ungfólki og er kórið á høgum støði.

Kenda sangkvinnan Óløf Kolbrún Harðardóttir byrjar konsertina við sangum um vár og summar og síðani kemur Eivør við øllum tónleikaverkinum Håb. Tað sigst, at atgongumerkini ganga sum heitt breyð.

## Listahátíð

Eivør verður partur av størri tiltaki seinni. Listahátíð Reykjavíkar verður í seinna helmingi av Mai mánað og tá er Eivør við á stórari konsert í Laugardalshøllini tann 29. mai. Konsertin hevur heitið Ísland-Írland. Tveir av størstu tónasmiðunum í Íslandi og Írlandi skriva tónleikin, Donald Runny og Hilmar Ørn Hilmarsson.

Donald Runny verður nevndur »the father of irish musical revival« og hann hevur samstarvað við kend nøvn í Írlandi so sum Sinead O'Connor, Elvis Costello, Kate Bush, Paul Brady og Rod Stewart. Hann skrivaði Emmy vinnandi tónleikin til »Bringing it all back home« og hevði eisini ein fingur við í spælinum til tónleikin til filmin »Titanic«. Bono úr U2 hevur kallað hann »The man of the sound«.

Hilmar Ørn Hilmarsson fekk Alex virðislønina fyri tónleikin til filmin »Børn náttúrunnar« og hann hevur lagt til rættis fyri størstu nøvnini í Ísalandi, til dømis Bjørk, Bubba og Megas og skrivaði stóra sangleikin Hrafnagaldur Óðins, sum Sigur Rós framførdi um allan heim. Hilmar Ørn var eisini limur í enska punk bólkinum Psychic TV í 80'unum.

Á konsertini tekur eisini lut írska sangkvinnan Róisin Elsafty, umframt Eivør.

Listahátíðin í Reykjavík er annað hvørt ár og er hæddarpunkt av tí,ið fer fram í býnum. Og tað tykist greitt, at nevnda konsert verður eitt hæddarpukt á Listahátíðini. Íslendska sjónvarpið hevur havt umrøðu av hátíðini og Eivør er stóra navnið í skránni og hon er eisini á forsíðuni á faldaranum, sum lýsir tiltakið. Somuleiðis er tað Eivør, sum verður nevnd, tá tosað verður um Listahátíðna í miðlunum.

Eini 3000 til 5000 fólk verða væntandi í Laugardalshøllini og fleiri eru frá altjóða miðlum.

Síðsta vár tók íslendska Rás 2 upp nakrar konsertir frá Airwaves fagnaðinum. Upptøkurnar eru nú seldar útvarpsstøðum kring í Europa og tann best umtókta konsertin er tann hjá Eivør í Nasa, Reykjavík. Eivør verður sostatt send til útvarpstól kring alt Europa og heimildarmaður okkara í Íslandi, Jens Guð, ivast ikki eina løtu í, at innan long tíð er umliðin, er Eivør stjørna á altjóða pallinum.











# Tað smakkar illa men tað er neyðugt

**Landsstýrið hevur nú av álvara sett skjøtil á at finna eina skipan, sum skal tryggja, at skipini hjá Strandferðsluni ikki aftur verða rakt av verkfalli**

STRANDFERÐSLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Landsstýrið hevur nú sett veruligan skjøtil á arbeiðið at royna at finna eina skipan, sum skal tryggja, at skipini hjá Strandferðsluni ikki aftur verða rakt av verkfalli.

Gongd kom veruliga á arbeiðið mikudagin, tá ið løgmaður hevði fund við Bárð Nielsen, landsstýrismann í fíggjarmálum, sum eisini hevur starvsfólkamál undir sær, og við Bjarna Djurholm, sum er landsstýrismaður í samferðslu.

– Á hesum fundinum varð avrátt, at landsstýrismaðurin í starvsfólkamálum skuldi kanna viðurskiftini í grannalondum okkara, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður sigur, at Sostatt skal Bárður Nielsen nú kanna eftir í Noregi, har nógv Strandferðsla er. Somuleiðis skal hann kanna viðurskiftini í Danmark, har nógv Strandferðsla hevur verið og okkurt er eftir enn og kanska kannar hann eisini støðuna í Íslandi.

– Endamálið við hesum kanningum er at vita, hvussu grannalond okkara hava skipað seg á hesum øki, sigur Løgmaður.

Hann sigur, at tá ið tað arbeiðið er liðugt, er ætlanin at kalla fakfeløgini til fundar fyri at vita, hvørja støðu tey hava til hesi viðurskifti og fyri at royna at fáa eitt samskifti í lag við tey um málið.

## Smakkar illa

Jóannes Eidesgaard viðgongur, at hetta er eitt ómetaliga eymt mál, tí ein loysn á hesum máli ber í sær, at fakfeløgini skulu siga verkfalsrættin frá sær og tað er rættiliga grundleggjandi hjá fakfeløgunum.

– Tað smakkar mær rættiliga illa, hóast tað bara er fyri eitt ógvuliga avmarkað tal av fólki!

Og hann leggur einaferð enn dent á ,at onki verður gjørt, sum fakfeløgini ikki kunnu góðtaka. Tað er eisini støðan hjá landsstýrinum

Hinvegin heldur Løgmaður, at tað er neyðugt at gera okkurt á hesum øki.

– Tað er ikki nógv rættvísi til, tá ið tað hvørja einastu ferð skulu vera tey somu økini í landinum, sum skulu betala prísin fyri verkføllini. Tað ber heldur ikki til at standa og hyggja at, tá ið vinnan í Suðuroy og í Sandoy, leggur stilt, hvørja ferð tað so mikið sum dregur á luftina á arbeiðsmarknaðinum og bara ein møguleiki er fyri verkfalli.

– Vit fingu hvørki verkfall fyri trimum vikum síðani, tá ið maskinmeistararnir samráddust, ella í farnu viku, tá ið navigatørararnir samráddust. Kortini legði fiskvinnan í Suðuroy og í Sandoy, stilt. Sostatt hevur verkfalshóttanin líka stóra ávirkan sum sjálvt verkfalli og tað ein trupulleiki, sum landsstýrið má taka upp og taka støðu til.

– Vónandi skilja so fakfeløgini eisini trupulleikan. Nú er so bólturin farin á rull og nú verður arbeitt miðvístfram ímóti einum úrslitið, leggur løgmaður afturat.

Og tað kann rættiliga skjótt verða aktuelt, tí longu í summar, verða aftur samráðingar við maskinmeistararnar.

Ein møguleiki, sum hevur verið nevndur, er at gera manningarnar til tænastufólk. Men tað hevur maskinmeistararnir roynt á Vaktar- og Bjargingartænastuni og tað angrar felagið, tí tað sigur, at landsstýrið hevur ikki verið at tosa við eftir tað.

– Tað er harmiligt, men tað mugu vit so av álvara taka upp við felagið. Tað er heilt greitt, at tað hvílur ein heilt serlig ábyrgd á landsstýrinum, tá ið mótparturin er tænastufólk, so at tey kenna seg trygg, sigur løgmaður.



*Løgmaður vissar um, at tað verður onki gjørt við skipini hjá Strandferðsluni, sum fakfeløgin ikki kunnu góðtaka*

# Forkunnugur matur á stórari veitslu í Hvalba

VEITSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið verður forkunnug veitsla í Roynhøllini í Hvalba.

Tað er áhugafelagið hjá Royn, sum bjóðar á nátaveitslu klokkan 20 leygarkvøldið.

Og fyrireikararnir leggja dent á, at byrjað verður stundisliga.

Sum tað liggur í orðinum, verður borðreitt við náta, ið nógv meta sum tann besta fuglin yvirhøvur og sum hartil er sera góður akkurát hesa árstíðina. Og borðreitt verður við nátanum, tá ið hann er allarbestur: Skáldaðum og kókaðum.

Men tað riggar ikki at eta náta við gaffli og hvalbingar heita á fólk um sjálvi at hava felliknív við.

Umframt matin, verður eisini ymiskt annað á skránni á veitsluni.

Tað mest forvitnisliga er, at ein filmur um ræning í Skúvoy verður vístur, har Tummas Frank Jensen, sum er góður bakkamaður og tikin úr leikum sum frásøgumaður, sigur frá.

Men harumframt verður spurnarkapping, har kappast verður borð ímóti borði. Ein meiri stuttlig spurnarkapping verður eisini, har gitast skal, hvussu nógv ávísar konur í Hvalba, viga.

Umframt tað verður eisini skemt og felagssangur í Hvalba.

Og tá ið borðhaldið er liðugt, fer kenda orkestrið, Trio, at spæla góðan dansitónleik.

Atgongumerkir eru at fáa við Bakkhús og í Pylsuvogninum og seinasta freist at keypa atgongumerki er fríggjakvøldið klokkan 22.

Atgonguemerki til borðhaldið og dansin kostar 150 krónur. Atgongumerki til dansin einsamallan, kostar 100 krónur.



*Roynhøllin verður karmur um hugnaliga veitslu í Hvalba í kvøld, har tað er best at hava felliknív við*

# Stevna í Havn fyri vaskikonum

**Leygardagin verður hugnalig og áhugaverd stevna í Havn fyri vaskikonum í víðastu merking**

STEVNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í morgin, leygardagin, verður stór stevna fyri vaskikonur í Havn.

Tað er Tora Tourist Traffic, sum skipar fyri hesum serliga vaskikonudegnum, sum verður í Norðurlandahúsinum og á Hotel Føroyum.

Sámal Bláhamar sigur, at hetta er ein stevna fyri vaskikonum í víðastu merking.

Sostatt er hetta bæði ein stevna fyri tær, sum ið hava tað sum starv, ið vaska. Men hetta er eisini ein stevna fyri tær, sum ikki vaska annað enn tað, sum tær vaska heima við hús.

– Men sjálvandi kunnu menn eisini vera við, sigur Sámal Bláhamar.

Sostatt er hetta rætt og slætt ein stevna fyri øll.

Hesin serligi vaskikonudagurin byrjar spakiliga klokkan 9 um morgunin, tí ið Norðurlandahúsið og fólk kunnu hittast og fáa sær ein drekkamunn við onkrum afturvið.

Sjálv skráin byrjar klokkan 10 við fyrilestrum og undirhaldi, og hildið verður fram til klokkan 14. Tað verður ongin annar enn Ingeborg Vinther, sum fer at seta stevnuna.

Av undirhaldi verður mótasýning. har vaskikonan kann vera ílatin, bæði tá ið hon vaskar og tá ið hon fer í búin aftaná. Og vaskikonan skal eisini lata børnini í og kanska mannin við, so tað verða eisini barnaklæðir og kanska eisini mannfólkaklæðir við.

Somuleiðis fer tann grøni vestminningurin, Finnbogi Joensen, sum hevur lagt stóran dent á umhvørvisvernd, eisini innan reingerð og hann fer at greiða frá sínum royndum. Aðrir fyrilestrar verða eisini, eitt nú fer ein tann dugnaligasti undirvísarin á ferðaleiðaraskílanum í Danmark at undirhalda.

Av tí, at hetta er altjóða arbeiðaradagur, verður høvið tá at fara í býin á 1. maidagshald. Samstundis hava bæði Hotel Hafnia og Sjómansheimi serlig mat tilboð til tey, sum eru við á degnum. Drúgvur leygardagur er tað eisini, so handlarnir hava opið til klokkan 17 og fleiri av handlunum fara esini at hava onkur serlig tilboð til tey, sum eru við á vaskikonudegnum.

Og í annaðkvøld endar tiltakið við vaskikonukvøldi á Hotel Føroyum við alskyns góðum og skemti og undirhaldi. Hvønn fulla tíma verða eisini ymsir vinningar burturlutaðir ogt á ið hákunardrongurin kemur í eygað, ber til at fáa kamar á hotellinum fyri serprís. Men tað er ikki við í prísinum.

– Sostatt eru nógvar góðar grundir at melda seg til dagin. Tilmeldingin til dagin og kvøldið kann fara fram við at betala 430 krónur á konto í Suðuroyar Sparikassa og so verður kontoavritið kvittan fyri tilmelding.

Sámal Bláhamar sigur, at hetta verður sostatt ein dagur, har tað ber til at taka sær av løttum.

Men samstundis er eisini eitt sindur av álvara í, tí tey, sum eru við, fáa sannliga eisini okkurt nyttugt at vita.



*Norðurlandahúsið verður karmurin um ein part av vaskikonudegnum í morgin*